**Vestmanna kommuna**
Bakkavegur 8 · FO-350 Vestmanna

# Reglugerð fyri Spælhúsið

**§1**. Spælhúsið er mentanarhøli, sum Vestmanna kommuna eigur og rekur.
Stk. 2. Hølini skulu virka sum karmur um mentanartiltøk av ymsum slag.
Stk. 3. Tað er umsitingin í kommununi vegna trivnaðarnevndina og bygdarráðið, ið umsitur Spælhúsið og hevur ábyrgdina av tí.

**§2**. Spælhúsið er ætlað til tiltøk, sum koma fólki í Vestmanna til góða.
Stk. 2. Alt virksemi, sum fer fram í Spælhúsinum, skal vera sambært avtalu við kommununa.
Stk. 3. Spælhúsið kann brúkast til framsýningar, fyrilestrar, tónleikaframførslur, verkstovur av ymsum slag, framløgur og annað, sum er mennandi og kveikjandi fyri vestmenningar og mentanarumhvørvið í bygdini.
Stk. 4. Felagsskapir, áhugafeløg, bólkar og einstaklingar kunnu eftir avtalu við kommununa fáa atgongd til Spælhúsið, men eingin uttan kommunan fær einstakan framíhjárætt til húsið.
Stk. 5. Felagsskapir og áhugafeløg kunnu eftir umbøn fáa afturvendandi atgongd til Spælhúsið, men ikki í meira enn eitt ár í senn.
Stk. 6. Umsóknir um tiltøk sambært stk. 2, skulu sendast kommununi.

**§3**. Matstovu-, kafevirksemi og beinleiðis sølutiltøk eru ikki loyvd í Spælhúsinum. Tó kunnu vørur, sum hava beinleiðis samband við eitt mentanarligt tiltak í Spælhúsinum, seljast. Okkurt drekkandi og okkurt smávegis afturvið kann seljast í sambandi við tiltøk.

**§4**.Felagsskapir og áhugafeløg, sum hava fast tilhald í Spælhúsinum, kunnu skipa fyri innanhýsis tiltøkum.
Stk. 2: Spælhúsið kann leigast til veitslur, føðingardagar og líknandi tiltøk. Hølisleigan er 2000 krónur um dagin. Fyrispurningar hesum viðvíkjandi skulu setast umsitingini í kommununi.
Stk. 3: Tiltakið kann ikki haldast í Spælhúsinum, um tað er sama dag, tá ein av felagsskapunum ella áhugafeløgunum, ið hava fast tilhald í Spælhúsinum, hava lagt dagin av.
Stk. 4: Tey, sum nýta Spælhúsið, hava ábyrgd av hølunum og skulu lata tey frá sær í sama standi, sum tey fingu hølini í. Krevjast ábøtur av møguligum skaðum ella øðrum, sum stendst av virkseminum, verður tann, sum skipar fyri virkseminum, at ábyrgdast fyri tað. Tað inniber eisini møguligar kostnaðir.

Vestmanna 27.08.2026

Sára

Sára Jógvansdóttir, borgarstjóri